# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Andlát og jarðarferðir

**Leif Isholm**, ættaður úr Tórshavn, andaðist á Harlev sjúkrahúsi 23. desember, 80 ára gamal.

**Tollakur Reynhamar**, andaðist í Danmark 22. desember, 74 ára gamal.

**Trúgvi Tausen**, ættaður úr Vági, andaðist í Íslandi sunnudagin 21. desember, 75 ára gamal.



**Dagurin**
**29. desember. Nóa**.
Dagur til minnis um mannin, sum gjørdi ørkina (1. Mós. 6-9).
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

# Tvíburar fylla 85

29. desember verða tær báðar systrarnar, Súsanna Poulsen og Jovina Mørk (føddar Joensen), 85 ár. Sanna og Vina, sum tær oftast verða nevndar, eru døtrar hjá Mikkjal og Súsonnu í Gortrastovu í Nólsoy, og sum navnið bendir á, so var Gortrastova í lonunum í Nólsoy barndómsheimið hjá teimum báðum.

Sum vera man, tá talan er um tvíburar, so hildu tær báðar nógv saman upp gjøgnum barndómsárini, og tó at lívið síðani leiddi tær báðar í egnar leiðir, so hevur sambandið altíð verið tætt.

Vina flutti á ungum árum til Havnar, har hon fór at tæna hjá Carl á Lag. Bæði sum genta í húsinum, og sum krambagenta í handlinum. Her hitti hon Mortan Mørk, sum um tað mundi starvaðist í Landshandlinum. Tey bæði giftust tann 28. august í 1943, og í øllum førum í B36 munnu nógv kennast við hetta brúdleypið. Mortan var ein av stovnarunum av árstalsfelagnum í Havn, og fyrsta steypið hjá B36 kom til høldar dagin eftir brúdleypið. Sum vera man, so komu leikararnir í brúðarhús, og soleiðis endaði fyrsta steypið hjá B36 í brúðarsongini hjá teimum báðum.

Tey bæði settu annars búgv í Hornabø, og fingu tey fýra børn. Magdalenu, Mikkjal (doyði í vár), Jógvan Martin og Mortan, sum øll eru búsitandi í Havn. Mortan, sum fyri nógv mundi vera ein býarmynd í Havn, doyði í 1994.

Frá tí at hon var gift, hevði Vina aloftast úr at gera við at halda heimið í Hornabø, men miðskeiðis í seksti-árunum fór hon í starv sum náttarvakt á hvíldarheiminum, Naina. Her starvaðist hon í gott og væl 20 ár, og øll hesi árini var hon fastur fúsur millum morgungestirnar í svimjihylinum, áðrenn hon spákaði sær heim í Hornabø.

Sanna kom á ungum árum saman við Tórálvi Poulsen (doyði í 1981) í Nólsoy, sum búi í somu lonini í Nólsoy, og tí gekk hennara leið ikki til Havnar á sama hátt sum hjá systrini. Tey bæði giftust undir krígnum, og eins og hjá systrini, so gjørdist talan eisini um fýra børn hjá Sannu, og sjálvsagt skuldi talan her eisini vera um tríggjar dreingir og eina systir. Av hesum er Jens tann einasti, sum enn býr í Nólsoy. Hans (doyði í 2002) búði í nógv ár í Hirtshals, meðan tey bæði yngstu, Jórun og Jørgin, bæði eru búsitandi í Havn.

Sambandið heur altíð verið sera tætt millum tær báðar. Og síðani tær fluttu í Heimið í Vallalíð, hava tær eisini búleikast lið um lið. Og tó at neistar onkra tíð kunnu standa frá, tá tær eru ósamdar, so blíðkast tær altíð so hvørt.

Líkar, sum tær eru, man tað eisini oftani vera komið fyri, at fólk ikki hava kent mun á teimum báðum, og søgurnar, sum tær hava fortalt um hetta, eru ikki so heilt fáar í tali.

Børn, ommubørn og seinnu árini eisini langommubørn hava tó altíð verið tað, sum hevur staðið fremst í huganum hjá teimum báðum. Fittar í hondunum, sum tær eru, er eitt ótal av klædnapløggum eisini smoygt upp á kroppin á eftirkomarunum, sum soleiðis ongantíð hava nýtst at óttast nakran kaldan vetur.



*Mong munnu tey vera, sum hava ilt við at skilja munin millum Sannu og Vinu. Her eru tær báðar avmyndaðar á fermingardegnum*

---

Okkara kæra kona, mamma, omma og vermamma

**Solveig Hansen**
fødd Poulsen
ættað frá Ljósá,
búsitandi í Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 28. des., 75 ára gomul.
Bønarhald verður á Landssjúkrahúskapellinum týsdagin kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Ebenezer mikudagin 31. des. kl. 12.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Alle, Jessie, Marjun og Jógvan við familjum**

Tey, ið ynskja at minnast Solveig, kunnu senda eina peningagávu til Føroya felag móti krabbameini

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymsan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá okkara kæri bróðir, svágur, mammubeiggi og ommubeiggi

**Jens Reinold Olsen**

andaðist og varð jarðaður.
Takk til Martin Restorff Jacobsen og Sverra Steinhólm, prestar, og Pól Færø fyri troystarrík orð í kirkjuni og í kapellinum og fyri umsorgan undir sváru sjúkraleguni.
Somuleiðis takk til tykkum øll, ið hjálptu til við jarðarferðini og ervinum.
Eisini ein tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu honum til seinasta hvíldarstaðin.

*Fyri tey avvarðandi*
**Hanni, Essemi, Poula og Jastrid**

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá okkara kæri pápi, verpápi og abbi

**Berint Juul Rasmussen**

doyði og varð jarðaður.
Tøkk til Niels Jacob Nielsen og Bøgesvang prest fyri góð og troystarrík orð.
Tøkk til kirkjutænarar og sangarar.
Tøkk fyri blómur og kransar og fyri gávur til eldrasambýlið Vesturskin.
Tøkk til tykkum á Vesturskin, sum vóru um hann hansara síðstu tíð.
Tøkk til lærararnar í Stranda Skúla, sum hjálptu til við ervinum.
Og øllum tykkum, sum fylgdu pápa til hansara seinasta hvíldarstað, takka vit hjartaliga.

*Fyri tey avvarðandi*
**Kaj, Óli, Egon, Eigil og Asta**